## Panic í HB

Í gjárkvøldið kom serbiski spælarin Jovan Radinovic-Panic til Føroya at royna síni fótbóltsevni. 26 ára gamli miðvallarin kemur úr Beograd, har hann hevur spælt fyri felag í næstbestu deildini. HB hevur fingið samband við serban ígjøgnum fótbóltsumboðsmannin Jákup í Stórustovu, og í fyrstu atløgu er talan um royndarvenjing í HB. Høvuðsstaðarfelagið vónar tó, at spælarin fer at vísa tær dygir, sum felagið vónar og væntar, so at hann kann spæla fyri HB í hesum kappingarárinum.




## Loyvini hjá Popczynski eru í lagi

Nú er arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá póllendinginum Krzysztof Popczynski komin upp á pláss, so at hann umsíðir kann kalla seg HB-venjari. Ætlanin var líka síðani í fjør verið, at Popczynski skuldi verða HB-venjari, og tað er nú eisini alment. HB skrivar á heimasíðu sínari, at umsíðir eru øll pappírini hjá venjaranum úr Krakow komin í rættlag, og tað fegnast felagið um.

# Nú kennir Landsfólkayvirlitið Sylla

**Í morgun er B36-spælarin Ahmed Davy Sylla skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum. Kappingarnevndin hjá FSF sigur seg einki hava við málið at gera**

SYLLA-MÁLIÐ
*Eyðun Klakstein/ Terji Nielsen*

Í dag kennist Landsfólkayvirlitið við navnið Ahmed Davy Sylla.

Í gjár varð hann ikki skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum sum búgvandi í Føroyum, men tað er hann í dag.

Tað er fólkayvirlitið hjá Tórshavnar kommunu, sum hevur gjørt skrásetingina av Ahmed Davy Sylla, og har var í gjár sagt, at Sylla er skrásettur í Tórshavnar kommunu. Orsøkin til, at hann ikki var at finna í Landsfólkayvirlitinum var søgd at vera, at so var málið ikki koyrt ígjøgnum hjá Landsfólkayvirlitinum.

### Eingin bíðitíð

Mannagongdin er, at kommunan sendir Landsfólkayvirlitinum allar flytingar so skjótt, sum tær eru klárar, og so verða persónar skrásettir í Landsfólkayvirlitinum beinanvegin. Lítil og eingin bíðitíð er eftir hesum.

– Um øll pappírini eru í lagi, skráseta við flytingarnar frá kommunalu fólkayvirlitunum sama dag, sum vit fáa tær. Onkuntíð bíða vit við skrásetingini,um øll pappírini ikki eru í lagi, og onkuntíð kunnu kommunurnar bíða eftir onkrum í málinum, verður sagt av Landsfólkayvirlitinum.

Lógin forðar fyri, at neyvar upplýsingar um slíkar flytingar kunnu latast almenninginum, og tí fæst ikki at vita, nær flytingin hjá Sylla til Føroya formliga varð gjørd.

Hvørki fólkayvirlitið hjá Tórshavnar kommunu ella Landsfólkayvirlitið kunnu upplýsa, nær ein persónur er skrásettur, men tað vanligari høvuðrokning ber til at staðfesta, at Landsfólkayvirlitið hevur skrásett Sylla innanfyri seinasta døgnið. Hinvegin kann málið hava ligið eina tíð hjá Tórshavnar kommunu og bíða.




*Ahmed Davy Sylla flutti í vetur frá ÍF til B36 at spæla, og spæliloyvið hjá honum hevur verið í B36 síðani 9. mars. Tí hevur Sylla havt loyvið at spæla fyri B36 síðani tá, og FSF staðfestir, at hetta spæliloyvið er galdandi*

### FSF ger einki

Kappingarnevndin hjá FSF hevði fund í gjár, og tá vóru reglarnir viðvíkjandi útlendskum leikarum viðgjørdar. Men í løtuni er eingin kæra um loyvið hjá Sylla, og tí var tað ítøkiliga málið als ikki viðgjørt, sigur Høgni í Stórustovu, formaður í kappingarnevndini.

– Tá ið Sylla fyrstu ferð kom til Føroya, var neyðugt hjá avvarðandi felag at útvega arbeiðs- og uppihaldsloyvi og váttan frá Landsfólkayvirlitinum, áðrenn Sylla fekk spæliloyvið. FSF skal fáa eitt ITC-loyvi, sum stendur fyri International Transfer Certificat, og samstundis skulu vit síggja arbeiðs- og uppihaldsloyvi, áðrenn hann fær spæliloyvið. Hesum syrgdi ÍF fyri, men tá ið hann skifti til B36, fekk havnarfelagið eisini ábyrgdina av at syrgja fyri, at øll viðurskifti vóru í rættlag viðvíkjandi arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Tað hoyrir ikki undir okkum, sigur Høgni í Stórustovu.

Formaðurin í kappingarnevndini sigur tí, at ein møguligur trupulleiki hjá Sylla og B36 ikki hevur nakað við FSF at gera.

## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvort av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*



ATLANTIC AIRWAYS




***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.